# UM AT FERÐAST Á NETINUM




At reika á netinum er ein natúrligur partur av gerandisdegnum hjá flestøllum, bæði børnum og vaksnum. Hetta setur krøv um skilagóðan atburð og hvussu tú tryggjar títt privatlív.

Undirvísingartilfarið leggur dent á seks viðkomandi tættir, ið stuðla upp undir fyribyrgjandi gongdina, ið er:

**VITAN + HUGBURÐUR = ATBURÐUR**

Ein væl tilrættisløgd undirvísingargongd í ymiskum lærugreinum, har næmingurin fer í dýpdina saman við sínum floksfeløgum, tryggjar at evnið verður tikið í álvara og fær neyðuga viðgerð.

Somuleiðis er sera umráðandi, at foreldrini hava ein virknan leiklut. Fyri hvørt evni er ein heimasetningur, har foreldrini og barnið í felag viðgera ymiskar spurningar, ið stinga seg upp í kjalarvørrinum av kunningartøknini.

Ein slík skipað tilgongd er – saman við foreldrafundum og øðrum átøkum í SSP – við til at menta okkara børn og ungu til at gerast skilagóðir og vandaligir brúkarar, tá ið tey reika á netinum og brúka mongu pallarnir og samskiftishættirnar har.

SSP

FØROYAPRENT | SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705